

10.000 starvsfólk hjá Shell missa arbeiði. Mynd: Shell

# Shell: 2800 starvsfólk afturat úr starvi

**Jógvan Hugo Gardar**

14.12.2015 - 12:30

Oljan.fo

Hollendski oljurisin Shell boðar í morgun frá at keypi av bretska oljufelagnum BG Group er komið uppá pláss. samstundis verður boða frá at oljurisin skal koyra fleiri fólk heim nú oljuprísurin er so lágur. Sagt verður at 2800 fólk fara at missa starvið, afturat teimum umleið 7500 sum fyritøkan longu hevur sagt fara at missa starvið.

hetta merkir at Shell skal koyra góð 10.000 starvsfólk heim komandi tíðina.

Keypið av BG Group er komiðuppá pláss aftaná at kinverskir myndugleikar nú hava góðtikið søluna.

Hvar Shell kemur at koyra fólk heim er enn ikki komið fram. Higartil vita tey millum annað at 120 av umleið 900 starvsfólkum hjá Shell í Noregi missa arbeiði.